HEILSANIR

Góða Elin Kristina
Hjartaliga tillukku á 4 ára føðingardegnum. Vit elska teg.
Mamma og babba.

Góða Turið
Hjartaliga tillukku við 15 ára degnum. Tú mást hava ein góðan føðingardag ynskja
Ari, Uni og Rói

Góði, elskaði Jóhan
Hjartaliga tillukku við 2 ára føðingardegnum 14. mai. Jesus pápi signi framtíð tína ynskja
mamma og pabba

Hey tit
Takk fyri seinast.
Heilsan KO-DAK



Góða fitta didda
Tillukku við 4 ára føðingardegnum. Eg eri so góð við teg. Eisini ein heilsan til Jón, sum fylti 5 ár tann 28. apríl.
Heilsan Birita

Góða, elskaða Turið
Hjartaliga tillukku við 15 ára degnum. Jesus pápi signi framtíð tína ynskja
mamma og Emil

Góðu Jóhan og Joan!
Hjartaliga tillukku við 2 og 17 ára døgunum 14. og 20. mai. Jesus pápi signi framtíð tykkara.
Heilsan omma og abbi

Góði allarbesti Alvin gubbi
Hjartaliga tillukku á 18 ára degnum. Gleði meg at sleppa biltúr. Jesus signi framtíð tína ynskir
Rakul

Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

5 ferðir um vikuna

Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag. Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:.....
.....
.....
.....
.....
.....

Myndina aftur: Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: .....
Bústaður: .....
Bygd/býur: ..... Tlf.: .....

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: **»Heilsanir«**

Summarskráin byrjar

ÚF

Nú summarið nærkast, sleppur útvarpið vetrarskránni og fer at senda eftir nýggjari skrá. Útvarpið er longu farið undir sínar ítróttasendingar, og hildið verður fram við teimum leygardag og sunnudag í summar.

Fylgt verður við landskappingardystum í fótbólti sunnudag og aðrar halgidagar, og seks vikuskifti frá fyrst í juni verður leygardag seinnapart sagt frá kappróðri á stevnunum.

Leygarkvøldini, tá stevnurnar eru, verður eisini skipað fyri sending av stevnunum kl. 19.00.

Útvarpið fer at fylgja við EM-kappingini í fótbólti í juni/juli. Skipað verður eitt nú fyri eini sending upp á ein tíma hvørt kvøld kl. 22.00 – eftir at dagsins dystir eru spældir. Har verður rúm fyri samrøðum, tíðindum, metingum, viðmerkingum og tónleiki.

Við summarskránni verður dagliga senditíðin stytt ein tíma um kvøldið og útvarpið fer vanliga at enda kl. 22.00 við tíðindum. Nakrar sendingar fara av skránni, meðan aðrar kom fram at aftur.

Barnasendingarnar verða repaðar sum vanligt er um summarið. Tær verða nú tríggjar um vikuna. Týsdag og hósdag kl. 09.03 og aftur sama dag kl. 18.00 og sunnumorgun kl. 10.03.

Summarsendingin Barometrið byrjar eftir hvítusunnu. Hon verður tveir tímar seinnapart frá týsdegi til fríggjadag. Mánadag seinnapart verður ein sending, sum Studio Pegasus skipar fyri.

Leygardagin kl. 17.00:

Sjómanssendingin Vitin

Lindin

Gestirnir í Vitanum eru Oddmar á Steig og Olaf Olsen.

Oddmar lesur brot úr »Føroya Siglingarsøgu«, tað sum hvur heitið »Burtur og heima«.

Vit hoyra m.a. um tá Nýggjaberg úr Miðvági gekk burtur við mann og mús.

Olaf sigur frá einum parti av lívssøgu síni. Vaks upp í Søldarfirði undir kríngnum, var til skips undir Føroyum, Íslandi, Grønlandi og í Barentshavinum. Tey 3 árini hann var við íslendskum trolara kundi hann leggja til síðis fyri sjómansskúlan. Kommunan á Flateyri tók ongan skatt frá føroyingum í takksemi fyri at teir vildu manna skipini, sum hoyrdu til bygdina. Teir gjørdu tað møguligt at fiskavirkini á landi høvdu nokk av fiski.

Vit hoyra um skipið »Vón« og um hvussu netavirkið Vónin kom í gongd, og hvussu umfatandi tað er í dag. Eisini hoyra vit um cubabátarnar og Beta.

Tíðin í politikki var ofta stævin, men eisini gevandi, men vinnulívið dámar honum betri.

Trúgvin á Guð hevur altíð havt stóran týdning fyri Olaf, og hevur tað enn, nú hann stundar til tey sjeyti.

Hetta er seinni partur av samrøðuni við Olaf Olsen.

Vertur er Símin Hansen.

Vitin verður endursendur sunnudagin kl. 15 og hósdagin kl. 16.

Vika 20 – 12. mai
Vinnaratøl: **01 - 02 - 08 - 10 - 36 - 48**

Eykatøl: **09 - 42**

6 vinnaratøl:	**3.610.325,- kr.**
5 vinnarat.+ eykatal	**82.442,- kr.**
5 vinnaratøl:	**4.087,- kr.**
4 vinnaratøl:	**119,- kr.**
3 vinnaratøl:	**37,- kr.**

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

GJALDOYRAKURSIR

Gjaldoyrakursir ásettir av danska Tjóðbankanum

		12.05.04	Ultimo apríl 2004
USA	**Dollarar**	627,6000	622,8500
Bretland	**Pund**	1111,1700	1104,5300
Svøríki	**Króna**	81,1500	81,3400
Noreg	**Króna**	90,7300	90,5100
Sveits	**Frankur**	482,8700	479,7400
Ísland	**Króna**	8,4500	8,4400
Kanada	**Dollari**	451,7900	454,2000
Japan	**Yen**	5,5459	5,6428
	Evra	744,1500	744,12800

FØROYA SPARIKASSI

KROSSORÐ



Vinnari:

Jógvan M. Jacobsen
Glyvravegur
625 Glyvrar

Loysnin frá seinastu viku
Loysunarorðið: EFTIRKANNING

E	R	L	A	-	K	O	N	G	S	J	Ó	T	T	Í	R
D	R	A	G	N	A	R		O	O		L	O	T	T	A
Í		F	A		R	A	D	A	R	Í		R		A	B
S	K	O	T	L	A	N	D		T	R		R		R	A
O	V	N	U	R			R	Ú	N	A		Í	N		R
N	E	T			E	U		F	A	N		C	O		B
374	N	A	R	T		N	K		R		B	E	R	T	U
A	N	Í		O	S	K	A	R			B	L	A	Í	R
O	K	N	Í	R	N	A	R		R	E		L		N	
R	Y	E		P	E	S	E	T	A			Í	N	N	Í
T	N			E	Í		N	A	S	K	Í			U	R
A	Í	D	S		Ð	Ð			K	A	L	Í	U	M	
	Ð			V	Í		S	H	A	R	O	N			S
Í		B	E	Í	R	U	T	H				D	Í		U
D	O	S		T		S	Í		U	L	P	U	N	U	M
A	P	A		A	G	A	K	O	M	F	Ý	R	U	R	

Hvønn fríggjadag

er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi í seinasta lagi **mikudagin**. Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum fríggjadagin.

Sendið loysunarorðið til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn –og viðmerkið »Krossorðagáta nr. .«á bjálvan.

375

Loysunarorðið: .....

Navn: .....

Bústaður: .....

Bygd/býur: .....

Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!

Frá ***BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:***

- ❑ **Úti á leysum oyggjum** - *Marianna Debes Dahl*
- ❑ **Matur í myndum** - *Sigrid Dalsgaard/ Beinta Johannesen*
- ❑ **Í skýmingini** - *Sofía Petersen/Elinborg Lützen*
- ❑ **Meistarin og teir fýra skrivararnir** - *Ulf Nilsson/Karl N. Hansen týddi*

Frá ***FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:***

- ❑ **Villini súgdjór** - *Dorethe Bloch/Edward Fuglø*
- ❑ **Rura** - *Þóra Þóroddsdóttir*
- ❑ **Havið** - *Bogi Hansen*
- ❑ **Íslandsklokkan** - *Halldór Laxness*
- ❑ **Fólk og mentan** - *Jóan Pauli Joensen*

Bøkur og annað tilfar – bæði innan og uttan skúlagátt